Dagf. 19. februar 2025
HMR j. nr. 25/04294-4

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-082/2024 eftir § 52 a í tingskipanini um at fyribyrgja spontanar abortir, frá Liljuni Weihe, løgtingskvinnu

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvørjar mannagongdir eru galdandi, tá kvinnur í Føroyum abortera?
2. Nær fáa kvinnur í Føroyum bjóðað hjálp í sambandi við spontanar abortir?
3. Hvat verður gjørt fyri at fyribyrgja spontanar abortir hjá kvinnum í Føroyum?
4. Er nøkur ætlan um at broyta mannagongdir?

Svar:

Til spurning 1

Í Føroyum er mannagongdin tann, at tá ið ein kvinna, sum er við barn, fer at bløða ella fær pínu, vendir hon sær til kommunulæknan, sum ávísir sjúklingin víðari til Gynækologisk ambulatorium.

Innanfyri heilt stutta tíð fær kvinnan tíð í Gynækologisk ambulatorium, har kvinnan verður kannað við m.a. eini ultraljóðsskanning, fyri at síggja, um fostrið er á lívi.

Um kanningin staðfestur, at fostrið er deytt, eru tríggir møguleikar:

1) Tað verður bíðað við at veita viðgerð fyri at vita, um fostur og móðurkaka fara av sær sjálvum

2) Heilivágur verður givin fyri at framskunda prosessina

3) Ein útskaving verður framd, sum er tað, sum eisini verður kallað ein “kirurgisk abort”. Í hesum sambandi kann nevnast, at tílíkar abortir verða mestsum ikki framdar longur.

Tað er ein læknafaklig meting, hvør loysn verður vald í hvørjum einstøkum førum.

Stoffskiftissjúkur kunnu vera ein viðvirkandi orsøk til, at kvinnur afturvendandi abortera. Um illgruni er um hetta, eftir at ein kvinna hevur havt spontanar abortir, verður kvinnan kannað fyri stoffskiftissjúku.

Til spurning 2

Ein kvinna, sum áður hevur havt eina spontana abort og gerst aftur við barn, fær bjóðað eina skanning tíðliga í viðgongutíðini. Hetta verður eisini gjørt fyri, at kvinnan skal kunna kenna seg trygga í einum komandi barnsburði, tí kvinnan kann hava ótta fyri at missa aftur.

Tað er vanligt at abortera tíðliga í barnsburðinum. 20 prosent av øllum barnsburðum enda sum spontanar abortir, harav eru 10 prosent so tíðliga, at kvinnan ikki veit av, at hon er vorðin við barn.

Í Føroyum fylgir Sjúkrahúsverkið mannagongdini hjá DSOG, (Dansk Selskab for Obstetrik og Gynækologi), har tað m.a. verður gjørd ein størri útgreining eftir tríggjar spontanar abortir. Tá verður gjørd ein víðkað kanning við blóðroyndum og kromosomkanningum, umframt ein gynækologisk kanning.

Til spurning 3 og 4

Sambært Sjúkrahúsverkinum finst í dag tíverri ikki nøkur góð viðgerð at bjóða kvinnum fyri at fyribyrgja spontanar abortir.

Sjúkrahúsverkið bjóðar sum nevnt kvinnum, sum hava havt spontanar abortir, eyka trygdarskanningar í byrjanini av viðgongutíðini. Eisini verður gjørd ein gynækologisk kanning, har man kann staðfesta møguligar vøddaknútar ella “misdannilsir” á lívmóðurini.

Í Føroyum fylgja vit somu mannagongdum sum í okkara grannalondum. Tað verður granskað í, hvussu heilsuverkið kann fyribyrgja spontanar abortir, og vónandi fer man í framtíðini at kunna hjálpa hesum kvinnum betur, enn í dag.

Kemur nýggj læknafrøðilig vitan fram um fyribyrgjandi viðgerð á økinum, sum viðførur broytingar í mannagongdunum í okkara grannalondum, verða mannagongdirnar eisini broyttar í Føroyum.

Heilsumálaráðið, 19. februar 2025

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna